tíðindablaðið
# sosialurin

Nr. 55 Týsdagur 19. mars 1996 70. árgangur Krónur 7,00



## Kyndil framvegis á meistarakós

Oddaliðið vann tryggan sigur móti H71, men STÍF vann eisini sín dyst, og gevur Kyndli dyst um gullkrónurnar

*Ítróttur síðu 17, 18 og 19*

## Tórmóður Dahl um A.P. Møller paranoia

– Jú, sanniliga eiga vit at vera á varðhaldi, tá tað snýr seg um alt, ið hevur við Den Danske Bank og A.P. Møller at gera, sigur Tórmóður Dahl millum annað í viðmerking í blaðnum í dag

**Síða 13**

***Árni Brattaberg fær kanska fyrstu oljumilljónina:***

# Højgaard & Schultz ætlar sær við í føroysku oljuvinnuna

Árni Brattaberg hevði lægsta tilboðið at gera boriplássið í Lopra klárt. Højgaard & Schultz ætlar at gera comeback í Føroyum, men teirra tilboð hevði fleiri fyrivarni

**Síða 12**

## Sjónvarpið senda úr tinginum allan dagin

Formansskapurin í Løgtinginum bjóðar SvF at senda úr tinginum frá øllum fundum. Hetta verður eitt nú gjørt í Íslandi. Tróndur Djurhuus, sjónvarpsstjóri, er áhugaður



**Síða 8, 9 og 10 um løgtingsviðgerðina av nýggju sjónvarps- og útvarpslógini**

*IRF ein sunn fyritøka:*

## Ruskið gevur yvirskot



Á ársfundi hjá IRF um vikuskiftið varð staðfest, at fyritøkan gevur yvirskot. Meiri sjáldsamt er tað, at IRF eigur ikki eitt oyra útistandandi hjá kommununum. IRF hevur bjóðað brennistøðini í Havn samstarv, men teir ikki so mikið sum øntu aftur

**Síða 6-7**

◆ NÝGGI WALT DISNEY STÓRFILMURIN **TOY STORY** FRUMSÝNDUR 22. MARS ◆ Havnar Bio

*Árni Brattaberg hevði lægsta tilboðið at gera boriplássið klárt:*

# Hann fær kanska ta fyrstu oljumilliónina

*Højgaard & Schultz ætlar sær at gera „come back" í Føroyum. Men teir hava so nógv fyrivarni, at tilboð teirra eigur at verða lagt til viks og eigur slettis ikki at verða tikið við, tá ið avgjørt verður, hvør skal hava arbeiðið.*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nu skal tann fyrsta oljumilliónin býtast út í Føroyum.

Tilboðini at gera boriplássið í Lopra byggiklárt, eru latin upp og nu skal gerast av, hvør skal hava arbeiðið.

Landsbyggifelagið hevur staðið fyri arbeiðnum at bjóða út. Arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión og 12 fyritøkur vórðu bodnar at bjóða: 10 føroyskar og tvær donsk.

Føroysku feløgini vóru Byggitek og Guttesen & Staksberg í Havn, Michael Pauli Johansen og Petur Hammer á Tvøroyri, J & K Petersen í Skopun, Brynjolf Kristiansen, Arni Brattaberg, South Island DSS Base og Tom Silvurdal í Vági, umframt Landsverkfrøðingin.

Donsku feløgnum vóru Højgaard & Schultz og Pihl & Søn, sum bæði eru væl kend á klettunum.

Sjey tilboð komu inn, seks føroyskt og eitt danskt.

Michael Pauli Johansen, South Island DSS Base, Landsverkfrøðingurin, Tom Silvurdal og Pihl & Søn bjóðaðu ikki.

## Helvtin á muni

Hósdagin vórðu tilboðini latin upp og tað var rættiliga stórur munur á prísinum.

Dýrasta tilboðið var næstan tvær ferðir so høgt, sum tað bíligasta.

Lægsta tilboðið hevði Arni Brattaberg, sum bjóðaði sær til at gera arbeiðið fyri 987.100 krónur. Beint í hølunum á teimum var Brynjolf Kristiansen, sum kundi gera arbeiðið fyri 991.514, 50 krónur, tað eru bara 4.414,50 dýrari enn Arni Brattaberg.

Øll hini tilboðini vóru omanfyri milliónina. Højgaard & Schultz bjóðaði 1.277.253 krónur, Petur Hammer bjóðaði 1.306.875 krónur, J & K Petersen bjóðaði 1.534.667 krónur, Guttesen & Staksberg, 1.637.589 krónur og Byggitek bjóðaði 1.729.800 krónur.

Á landsbyggifelagnum var eingin at hitta, sum kundi úttala seg um tilboðini, maðurin var burturstaddur.

Og Arne Rosenkrands Larsen á Dong var eisini burturstaddur.

Men eftir hvat skilst á onkrum av teimum, sum bjóðaðu, hevur landsbyggifelagið treytað sær at velja og vraka ímillum tilboðini, ella at vraka øll, um so skuldi verið.

## H & S útihýsir seg sjálvt

Eitt, sum fall í oyruni á teimum, sum vóru til staðar, tá ið tilboðini vórðu upplatin, var tilboðið frá Højgaard & Schultz.

Í pengum lá tilboðið frá Højgaard & Schultz mitt í rúgvuni, men teir hava so nógv fyrivarni, at onkrir av hinum tilboðsgevarunum halda, at teir mestsum hava útihýst seg sjálvar frá uppgávuni, siga aðrir tilboðsgevarar fyri Sosialinum.

Í tilboðnum tekur Højgaard & Schultz m.a. fyrivarni fyri at halda tíðarfreistina, sum er, at arbeiðið skal verða liðugt fyrst í mai, verður sagt fyri okkum.

Teir hava eisini tikið fyrivarni fyri, at tað verður neyðugt at spreingja og teir hava heldur ikki roknað uppí tilboðið, at asfaltið skal takast avaftur, um landsverkfrøðingurin ikki vil hava tað. Somuleiðis skal moldin fyribeinast, men fyrivarni er eisini tikið fyri tí.

Kønir menn halda, at skal prísurin fyri fyrivarnini leggjast afturat tilboðnum hjá H & S, dýrkar tað tilboðið minst 200.000 krónur, helst meiri.

Men kjarnin í málinum er, at tilboðstilfarið varð væl lýst og at H & S hevur ikki fylgt tí. Teir hava soleiðis ikki bjóðað uppá tað, teir vórðu biðnir at bjóða uppá, siga aðrir tilboðsgevarar fyri okkum.

Tí eigur tilboð teirra ikki at verða tikið við, tá ið gjørt verður av, hvør skal hava arbeiðið.

Teir nevna t.d. at hinir, sum hava bjóðað, hava verið noyddir at útvega sær eyka arbeiðsmegi og maskinorku fyri at kunna halda tíðarfreistina. Sleppur Højgaard & Schultz undan hesum, og sleppa teir undan hinum fyrivarnunum, eru tilboðini givin á skeivum grundarlag.

Tað stóð í útbjóðingartilfarinum, at teir, sum bjóðaðu, høvdu skyldu at møta á byggiplássinum at seta seg inn í viðurskiftini.

Ístaðin fyri at gera tað, hevur H & S tikið fyrivarni fyri einum og øðrum.

Aðrir tilboðsgevarir ivast tó ikki í, at bæði landsbyggifelagið og Danop vita hetta, og senda H&S tilboðið aftur í høvdið.

Men skuldu teir fingið arbeiðið, ivast vit ikki í, at klagað verður til meistarafelagið, siga teir fyri Sosialinum.

Aðrir tilboðsgevarar hava eisini tikið onkur fyrivarni, men ikki nær og námind av tí, sum H & S tók.

Tað eydnaðist okkum ikki at fáa eina viðmerking frá Højgaard & Schultz, áðrenn blaðið fór til prentingar.



*Føroyskar fyritøkur liggja heilt væl fyri at fáa tað fyrsta, hampuliga stóra arbeiðið, tað ber til hjá føroyingum at gera í Lopra.*

*Ein donsk fyritøka hevur bjóðað, men kønir menn halda, at hon hevur útihýst seg sjálvan.*

## Tilboðini í Lopra

Tilboðini, sum eru komin inn uppá arbeiðið at gera byggiplássið í Lopra klárt at bora, eru hesi:

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Arni Brattaberg | 987.100,00 kr |
| 2 | Brynjolf Kristiansen | 991.514,50 kr |
| 3 | Højgaard & Schultz | 1.277.253,00 kr |
| 4 | Petur Hammer | 1.306.875,00 kr |
| 5 | J & K petersen | 1.534.667,00 kr |
| 6 | Guttesen & Staksberg | 1.637.689,00 kr |
| 7 | Byggitek | 1.729.800,00 kr |


**Ellis- og Avlamisheimið í Vágum**

**370 Miðvágur**

søkir eftir avloysarum fyri sjúkrasystrar, sjúkrahjálparar og hjálparfólk.

Skrivlig umsókn verður at senda áðrenn 15. apríl 1996.


## Fram og Skansin vunnu

Fyrstu innleiðandi dystirnir í kappingini um løgmanssteypið vóru sunnudagin. Fram vann móti Æsir, og Skansin sigraði á AB.

Sostatt er greitt, at í næsta innleiðandi umfarinum hittast liðini soleiðis:

Skansin-Royn
Skála-LÍF
SÍ-Fram

Dystirnir verða spældir 23. og 24. mars, og eftir teir dystirnar er klárt at fara undir hálkaspælið, sum byrjar 31. mars.

ek


**DANNY TRANSPORT**

– tá okkurt skal koyrast ella goymast

**Tlf. 19192**